H71-Kyndil 24-23 (13-17):

# Kyndilin slóknaði

**Bara seks mál í 35 minuttir bendir ikki á nakað meistaraspæl. Og tað var fyrst og fremst hetta, sum kostaði, tá hoyvíkingar sunnudagin køvdu logan hjá Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*




*Høgni Klein og Kyndil høvdu fyri steðgin gott tak á. Men innskiftingin av Bárði Brimvík munaði sera væl hjá H71, sum í seinna hálvleik stríddi seg í einsamalla oddastøðu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uttan leikbannaðu Jakob Jónsson og Trónd Vatnhamar vóru fortreytirnar hjá hoyvíkingum avgjørt ikki tær bestu sunnudagin. Teir báðir fingu reytt kort, tá H71 var fyri óvæntaðum tapi í dystinum móti Kyndli í grundspælinum. Eitt tap, sum í sjálvum sær kom illa við, og tað gjørdi ikki lagi betri, at leikbannini so enntá raktu beint á fyrsta oddabrakið í endaspælinum.

Fyri steðgin var eisini líkt til, at hetta skuldi gerast dupul-dýrt hjá H71. Hóast eftirverandi spælararnir royndu at stríðast. Og hóast Halgir Dahl Olesen nú aftur var partur av liðnum eftir at slitnu knøini hava hvílt í hálvan annan mánað, so tóktist hetta ikki vera nóg mikið.

Eftir eina kanska varisliga byrjan upp á dystin, so kom Kyndil veruliga ígongd eftir einum 10 minuttum. Verjan kom upp at koyra hampuliga væl, og so kundu teir revsa hoyvíkingar við kvikum mótálopum. Og var H71-verjan komin upp á pláss, so tóktust stóru menninir nakað tungir í mun til kviku kyndlarnar, sum fleiri ferðir brutu seg ígjøgnum, soleiðis at brotskast varð einasti útvegurin. Brotskøst, sum ein væl upplagdur Høgni Klein ósvikaliga trygt sendið í meskarnar heili f‡ra ferðir á rað eitt skifti.

## Á gamlar gøtur

Seinastu løtuna undan steðginum vóru tó glottar at hóma hjá H71. Í verjupartinum fingu teir spælið upp at koyra, soleiðis sum áskoðararnir eru vanir við.

Serliga vóru tað tvær innskiftingar, sum gjørdu munin í so máta. Í málinum hevur Levi Nybo annars verið H71 ein góður maður nú í eini fýra ár, men hesa ferð var hann ikki heilt á toppinum, og tí var Jens á Skipagøtu, sum nú aftur er heima, settur í málið. Við T-shirt og jogging-buksum líktist hann mest av øllum einum harðførum sjómanni, men eyðkendi stílurin í málinum var ikki at fara skeivur av. Og ótilvitað mundi ráa útstrálingin eisini benda hoyvíkingarnar á kanska mest grundleggjandi elementið í spæli teirra. Nevnliga óviljan móti at geva seg undir nakað siðvant yvirvald. Í so máta kann kanska sigast, at H71 við hesum leitaði aftur á gamlar (Skipa)gøtur!

Og so kom Bárður Brimvík eisini inn á strikuna. Fyrrverandi landsliðsspælarin hevur annars ikki spælt tað stóra, síðani hann fyri nøkrum árum síðani sleit krossbandið. Einamest, tí hann fyri tað nógva ikki hevur búð í Føroyum alla tíðina. Men nú er hann heima, og ávirkan hansara á dystin kann neyvan undirmetast.

Tí knappliga koyrdi verjuparturin. Ikki bara væl, men 100%. Snøgt sagt, so slapp bara eitt mál, og so kundu hoyvíkingarnir spakuliga eta leiðsluna aftur.

Seinastu løtuna undan steðginum bleiv 10-17 til 13-17, og eftir steðgin helt munurin á fram at minka. Kanska skutu hoyvíkingarnir ikki so øgiliga nógv mál, men so leingi Kyndil einki fekk, so gjørdi tað mun hvørja ferð. Tí Kyndils-verjan stóð seg slettis ikki so illa. Hóttanin hjá H71 var fyri tað mesta stóra skotstyrkin hjá Halgiri og Piti, og hendan var eisini nóg mikið.

Øll høllin var á gosi, tá H71 við 13 minuttum eftir fór framvið Kyndli, og tó at teir grønu nú spakuliga byrjaðu at svara aftur, so var viljin hjá H71 ikki at benda.

fekk pyntað um støðuna seinasta góða minuttin bilti ikki stórvegis. Sigurin og stigini fóru til Hoyvíkar, og so er H71 einsamalt á odda, nú eitt umfar er farið av endaspælinum í Atlantic Airways-kappingini.

Enn eru tó ikki allar súður syftar. Fyrst og fremst, so eru framvegis níggju dystir eftir at spæla í endaspælinum. Og hartil, so verður eisini talan um finaludyst millum tey bæði fremstu liðini í deildini. Men ein góð byrjan er ikki at forkasta, og í øllum førum, so hava hoyvíkingarnir skapt sær eitt fínt útgangsstøði til endaspurtin.

Hjá Kyndli mundi tapið svíða eyka nógv, tá hugsað verður um fortreytir undan dystinum - og dystargongdina sum heild. Enn er liðið tó at finna á øðrum plássi, har kappingin tó er beinhørð. Komandi umfarið er talan um dyst móti Neistanum, og tann dysturin eigur at geva tvey stig. Bæði tí Kyndil á papp írinum er væl sterkari enn grannarnir, men eisini tí Kyndil hevur ein sera greiðan tørv á stigunum.

## FAKTA UM DYSTIN

**H71-Kyndil 24-23 (13-17)**
**Málskjúttar**
**H71:** Halgir Dahl Olesen 7, Piti Negru 7, Ólavur Brimnes 4, Niels Viggo Niclassen 2, Poul Kjartan Dam 1, Bjarni Sørensen 1, Johnny Durhuus 1, Ólaf Vesturgarð 1
**Kyndil:** Høgni Klein 10((5), Rókur Akralíð 6, Josef Abrahamsen 3(1), Marius Joensen 2, Hans Arni Thomsen 1, Janus Einar Sørensen 1, Hans Áki Dal-Christansen 1, Hjalti M. Jacobsen 1
**Brotskøst:** H71 2, Kyndil 6
**Útvísingar:** H71 4, Kyndil 4
**Dómarar:** Dánjal Hansen & Kári Hansen. Linjan var ikki altíð eins løtt at fylgja, og í einstøkum førum var talan um regulerar feildómar

# Teir vildu meira




er bara ikki nóg gott, ljóðaði kontanta staðfestingin.

*Var tað kanska so, at tit í hálvleikinum longu hildu tykkum hava vunnið dystin?*

– Nei. Móti H71 hevur tú ongantíð vunnið, fyrr enn dysturin er liðugur. Men teir stríðast betri enn vit eftir steðgin, og yvir høvur eru teir ídnari. Og tað mugu vit so læra av, heldur hann.

Við verandi skipan, har talan verður um finaludyst, so nýtist talan ikki at vera um nakað katastrofalt tap. Men Høgni staðfestir, at liðið heilt skjótt skal lyfta seg, um teir vilja verða partur av FM-finaluni.

– Vit skulu gerast nummar eitt ella tvey. Og tað krevur nakrar sigrar komandi dystirnar. Hartil skulu vit longu mikudagin spæla hálvfinalu í steypakappingini móti StÍF. Og tað er í sjálvum sær ein stór uppgáva, sum vit eisini ætla okkum at loysa. Vit skulu jú helst sleppa í finaluna at spæla móta aðrudeildarliðnum hjá okkum, segði Høgni, sum soleiðis eisini hevði orkuna til okkurt smílið hóast alt.

**-mørk**

# Verjan hevði alt at siga



*Eftir hvíld í hálvan annan mánað, tykjast knøini hjá Halgir nú aftur at hava tað nakað betri*

*Mynd: Álvur*

Eingin ivi var um, hvør stóri maðurin í H71-leguni var eftir dystin sunnudagin.

Halgir Dahl Olesen tosaði í heyst um, at støðugu trupulleikarnir við knænum kanska fóru at seta ein steðg fyri hondbóltinum hjá sær. Sunnudagin var hann tó aftur partur av liðnum hjá H71. Og við sjey málum umframt einum ósvikaligum stríðsvilja var hann eisini ein av høvuðsmonnunum handan sigurin. Nakað, sum spælarin sjálvur tó ikki hevði nakran hug at staðfesta.

– Seinastu løtuna undan steðginum fáa vit verjuna at koyra. Bárður og Jens gera eitt fantastiskt arbeiði, tá teir koma inn, soleiðis at teir veruliga lyfta alt liðið.

Var tað kanska eisini so, at teir báðir vóru við til at finna »gamla« stríðsviljan hjá H71 aftur.

– Ja, avgjørt. Og at vit alla tíðina halda á at stríðast ger eisini, at Kyndilsspælararnir verða alt meira frustreraðir, haldi eg.

*Og slitnu knøini klára kanska at taka endan av hesum kappingarárinum við?*

– Tað vóni eg. Beint nú hava tey tað fínt, men so er spurningurin, hvussu tað verður í morgin.

– Í øllum førum haldi eg, at hvíldin hevur hjálpt nakað. Hartil er hetta ikki ein skaði, sum versnar nakað av at spæla. Tað er ein spurningur um pínu, men verður tað framhaldandi so stuttligt at spæla við H71 í ár, so rokni eg við, at eg kann bíta hesa í meg, sigur altso Halgir Dahl Olesen at enda.

**-mørk**